## Jákup á Borg er givin á landsliðnum

Jákup á Borg hevur boðað Brian Kerr, landsliðsvenjara, frá, at hann er ikki longur tøkur á landsliðnum. 30 ára gamli havnarmaðurin, sum hevur spælt við B36, HB og danska OB, hevur hvørki orku ella tíð at umboða Føroyar í altjóða høpi. Hann hevur hugsað um at takka fyri seg leingi, og nú er avgerðin tikin. Orsøkin er fyrst og fremst, at hann hevur verið illa plágaður av skaðum seinastu árini. – Eg eri ikki ein unglingi longur. Eg havi tørv á hvíld, og eg seti meg ikki føran fyri at spæla við fullari megi á landsliðnum, sigur Jákup á Borg, sum er stjóri á fyritøkuni Bilrøkt. Jákup á Borg sigur, at Brian Kerr harmast um avgerðina, men B36-leikarin hevur tikið støðu. Jákup á Borg er skrásettur fyri 69 altjóðar landsdystir og tvey mál fyri Føroyar.



# Bernd og Besiktas við fullari ferð

**EUROPA LEAGUE** Tey sum høvdu vónað, at Bernd Schuster og Besiktas fóru at taka sær av løttum í gjárskvøldið, fóru vónbrotin til húsar. Tí Bernd Schuster hevði valt fleiri av stjørnuleikarunum til at byrja inni og teir spardu seg ikki. Tað endaði við, at Besiktas vann ein lættan 4-0 sigur á Víkingi





*Bernd Schuster gav sær góðar stundir til føroysku fjølmiðlarnar. Ricardo Quaresma (tv.), við fýra víkingum rundan um seg, var torførur at steðga*

Myndir: Jens Kristian Vang

Tróndur Arge

Tað gingu bara tríggir minuttir, so hevði Besiktas longu lagt seg á odda 1-0 á Svangaskarði. So var støðið líka sum lagt. Løtu seinni lá bólturin aftur í málinum hjá Geza Turi og stórtap lá í luftini. Tá Besiktas vann fyrra dystin greitt, spurdi Sosialurin Bernd Schuster, hví hann stillaði upp við Nihat, Ricardo Quaresma og hinum stjørnunum.

– Eg sá fyrra dystin millum HB og Red Bull Salzburg og hoyrdi síðani at HB hevði vunnið seinna dystin 1-0. Men tað er ikki tí, at eg valdi Nihat og Quaresma til liðið í kvøld, men heldur tí at teir skulu helst spæla 90 minuttir nú áðrenn kappingin hjá okkum byrjar, sigur Bernd Schuster við Sosialin.

### Jógvan Martin í øðini

Áðrenn farið varð til hálvleik hevði Besiktas skorað til 4-0. Víkingur hevði onkran einstakan møguleika upp á deyðbólt, men einki spurdist burturúr.

– Vit eru vánaligir í verjupartinum í fyrra hálvleiki. Tað eru kanska tveir leikarar, ið spæla til eitt nøktandi støði. Vit høvdu fyrireikað okkum so væl sum vit kundu, men tá dysturin byrjaði, gekk alt galið. Vit standa illa í verjupartinum og fáa ikki fatur á teimum, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi.

### Tamur seinni hálvleikur

Teir undir 500 áskoðararnir fingu ikki nógv fyri pengarnir í seinna hálvleiki. Víkingur hevði strammað upp í verjupartinum og Besiktas leikararnir tóku sær meira av løttum. Úrslitið av tí varð, at Besiktas spældi bóltin sínámillum, men royndi sum so ikki at skora tey nógvu málini. Víkingur lá djúpt og hevði ilt við at skapa nakað frameftir.

### Bernd Schuster um at møta Víkingi

– Tað torførasta við at spæla ímóti liðum sum Víkingur er, at tú kennir einki til tey. Tað er ikki møguligt at síggja tey í sjónvarpinum og tað er torført at fáa upplýsningar um liðini. Kappingin hjá tykkum er eisini í gongd nú og tekur tú tað hartil róliga, so er skjótt at okkurt óvæntað hendir, sigur Bernd Schuster.

### Klára ikki avleveringar uppá 5 metrar

Víkingur var slett ikki at kenna aftur frá fyrra dystinum í fyrra hálveiki. Einki riggaði og teir blivu revsaðir fyri mistøkini.

– Hetta er væl munurin á fulltíðarleikum og áhugaleikum. Vit skuldu raka dagin, um vit skulu koma frá dystinum við skinninum á nøsini, men tá vit ikki klára at leggja avleveringar uppá fimm metrar, so er líkamikið. Vit møttu ikki einum liði, ið var 3-4 klassar betri enn vit, men nógv fleiri klassar betri, sigur Jógvan Martin Olsen.

### Úrslitið sigur sina søgu

Spurdur um støðið hjá Víkingi svarar Bernd Schuster so:

– Úrslitið sigur sjálvandi sína søgu og tit vinna nokk ikki Champions League ella Europa League. Tit eru eitt lítið land, men tit kunnu fáa nógva royndir av at royna tykkum ímóti størri liðnum. Millum annað tað at sleppa at spæla framman fyri 30.000 áskoðarum, sum Víkingur gjørdi í fyrra dystinum. Víkingur má so gera tað besta teir kunnu, staðfestir Bernd Schuster til seinast.

### Vit mangla nógv enn

Dysturin í gjárskvøldið staðfesti bara munin millum Víking og Besiktas. Og hann er stórur, kanska alt ov stórur. Nú hava øll tey føroysku liðini roynt seg í Evropa í ár og vit fingu bara ein sigur. Restin varð tap og tað á ein hátt ikki gott nokk. Vit hava nógv eftir at læra í Evropa og vónandi kann Víkingur læra nógv av dystinum í gjár, tí teir høvdu eitt ungt lið á vøllinum og vónandi koma hesir at gera um seg næstu ferð Víkingur spælir í Evropa.

*trondur@sosialurin.fo*

---

**Europa League** · Svangaskarð 23. juli 2010, kl. 19.00

**Víkingur - Besiktas** 0-4 (0-4)

(Besiktas vinnur samanlagt 7-0 og ferð víðari)

**0-1 Ekrem Hayyam Dag, 3.**
**0-2 Nihat Kahveci, 10.**
**0-4 Da Silva Bobo, 32.**
**0-3 Da Silva BobO, 44.**

Dómari: Mattias Gesteranius, Finnland

**Víkingur:** Geza Turi - Bárður Hansen, Niclas Niclassen, Erling Jacobsen, Hanus Jacobsen - Sølvi Vatnhamar (Hjartvard Hansen, 87.), Sam Jacobsen, Nenad Stankovic, Hans Jørgen Djurhuus (Kaj Leo í Bartalstovu, 53.) - Páll Klettskarð (Sverri Jacobsen, 76.) og Finnur Justinussen.
***Gul kort:*** Hans Jørgen Djurhuus, 33.

**Besiktas:** Hakan Arikan - Erhan Guven, Tomas Zapotocny, Tomas Sivok (Matteo Ferrari, 46.) - Ekrem Hayyam Dag (Onur Bayramoglu, 57.), Matias Emilio Delgado, Fabian Ernst (Ugur Inceman, 46.), Ricardo Quaresma - Nihat Kahveci og Da Silva Bobo
***Gult kort:*** Ugur Incemann, 81. og Matteo Ferrari, 92.